Eysturkommuna

# NEVNDARFUNDUR

## Býráðið

**Dagfesting:** 27.04.2023 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Per Martin Gregersen
Katrin Kjartansdóttir
Magnus Skoralíð
Marjun Andreasardóttir
Rúni Justinussen
Marita Klein Joensen
Petur Súni Jacobsen
Hjalti Dalheim
Hanna Jensen

Varalimir:

Ikki møtt:

Nevndarskrivari: Ove Heinesen

Petur Súni Jacobsen var ikki við í viðgerðini av máli nr. 23/00026.


| **Málsyvirlit** | | | **Síða** |
|---|---|---|---|
| **Mál til viðgerðar:** | | | |
| 22/23 | 23/00026-2 | Sundurbýti av matr. nr. 169 á havnalagnum í Leirvík við Lugarið til leiguøkir | 3 |
| 23/23 | 23/00155-2 | Tilmæli og frágreiðing - 23/00155 | 5 |
| 24/23 | 23/00166-2 | Umsókn um byggiloyvi til altan á neyst matr. nr. 233 LV | 7 |
| 25/23 | 23/00195-3 | Umsókn um altan til neyst á Matr.122 í Syðrugøtu | 9 |
| 26/23 | 21/00398-2 | Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00389 - Umsókn um stuðul til Filmsætlan um Verdandi | 11 |
| 27/23 | 22/00442-4 | Umsókn um stuðul - Tinganes (stuttrøð) | 14 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 28/23 | 23/00118-3 | Umsókn um stuðul - Tónleikasamtakið Grót | 16 |
| 29/23 | 23/00140-3 | Umsókn um stuðul til Eldrafelagið Fjallið 2023 | 17 |
| 30/23 | 23/00162-3 | Umsókn um Mentanarstuðul - Skótaliðið Leirvíks Páll | 18 |
| 31/23 | 23/00171-4 | Umsókn um stuðul til filmsverkætlan - Trøllini og huldugentan | 19 |
| | | | |

**Mál til viðgerðar:**

## 22/23 Sundurbýti av matr. nr. 169 á havnalagnum í Leirvík við Lugarið til leiguøkir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 18.01.2023 | 3/23 | 23/00026-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 23.01.2023 | 4/23 | 23/00026-2 |
| 3 Býráðið | 26.01.2023 | 6/23 | 23/00026-2 |
| 4 Vinnunevndin | 19.04.2023 | 10/23 | 23/00026-2 |
| 5 Býráðið | 27.04.2023 | 22/23 | 23/00026-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Umsitingin hevur gjørt uppskot til skipan av Havnaøkinum í Leirvík við Lugarið.<br><br>Umsitingin mælir til, at gera sundurbýti sambært uppskotinum, og frá matrikulera 9 grundøkir frá matr. nr. 169 á havnalagnum í Leirvík við Lugarið, sí tekning.<br><br>**Ískoyti:**<br>Umsókn um sundurbýti og korti hvussu sundurbýti er ætla. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at sundurbýta økini, sum víst á tekning. |

**Vinnunevndin 18. januar 2023**
Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Fíggjarnevnd 23. januar 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá vinnunevndni.

**Býráðið 26. januar 2023**
Einmælt samtykt at beina málið aftur í vinnunevndini at víðari viðgerð

**Vinnunevndin 19. april 2023**
Vinnunevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini.

**Býráðið 27. apríl 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Vinnunevndini.

## 23/23 Tilmæli og frágreiðing - 23/00155

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 28.03.2023 | 20/23 | 23/00155-2 |
| 2 Býráðið | 30.03.2023 | 18/23 | 23/00155-2 |
| 3 Fíggjarnevnd | 30.03.2023 | 21/23 | 23/00155-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | 24.04.2023 | 23/23 | 23/00155-2 |
| 5 Býráðið | 27.04.2023 | 23/23 | 23/00155-2 |

**Málslýsing:**

Víst verður til fyriliggjandi yvirlit yvir íløgur fyri í 2022. Sambært hesum verður neyðugt at veita eykajáttan á 7.325.000,00. Talan eru um arbeiði, sum eru farin í gongd í 2022, men sum ikki verða gjørd liðug fyrrenn í 2022.

Á fíggjarætlanin fyri 2023 eru 1.650.000 kr. avsettar til arbeiðið at víðka kirkjugarðin í Leirvík. Ætlanin var at hetta arbeið skuldi verða gjørt yvirr 3 fíggjarár og skuldi verða liðugt í 2024, men arbeið verður ligugt í ár og tískil verður neyðugt at veita eina eykajáttan á 850 t.kr til hetta. Samlaði kostnaðurin verður tó ikki hægri enn samtykt.

Eingir pengar eru avsettir til gøtuljós (íløgur), men neyðugt verður at keypa nakað av nýggjum ljósum/steyrum og tí verður neyðugt at veita eina eykajáttan til hetta á 250 t.kr.

Samlaðu eykajáttaninar veða sostatt 8.425.000,00 kr.

**Ískoyti 29. Mars 2023**
Umframt omanfyri standandi verður neyðugt at veita eykajáttan á 1.050.000,00 til útstykkingina í Fløtugerði í Leirvík. 450 t.kr av hesum vóru avsettaa á fíggjarætlanini í 2022, men samlaði kostnaðurin av útstykkingini verður 600 t.kr hægri enn avsett, og tí verður eykajáttanin í 2023 uppá 1.050.000,00 kr.

**Fíggjarligar avleiðingar:**

Samlaða úrslitið (RLÚ) verður 8,4 mió lægri enn á samtyktu fíggjarætlanini fyri 2023. Gjaldføri og ein møgulig lántøka verður tó bert ávirkað av eykajáttanini til kirkjugarðin og gøtuljós, tí rest eru íløgur sum verða fluttar frá 2022 til 2023. Meirinntøkan higar til í ár er hægri enn eykajáttanin til kirkjugarðin og gøtuljós, og tí kemur hetta heldur ikki at ávirkað endaliga úrsliti fyri 2023 sum nú er.

**Tilmæli**

Mælt verður til at veita eykajáttan á 8.425.000,00 kr. , og at peningurin verður tikin av innistandandi.

**Ískoyti 29. Mars 2023**

| |
|---|
| Mælt verður til at veita eykajáttan á 9.475.000,00 kr. , og at peningurin verður tikin av innistandandi. |

**Fíggjarnevnd 28. mars 2023**
Fíggjarnevndin mælir til at taka undir við tilmælinum hjá umsitingini, og veita eykajáttanir á íalt 8.425.000,00 kr.

**Fíggjarnevnd 30. mars 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tlmælinum, og veita eykajáttanri á íalt 9.475.000,00 kr.

**Býráðið 30. mars 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá fíggjarnevndini.

**Fíggjarnevnd 24. apríl 2023**
Mæla til at veita eykajáttan eins og samtykt við 1. viðgerð

**Býráðið 27. apríl 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

## 24/23 Umsókn um byggiloyvi til altan á neyst matr. nr. 233 LV

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.04.2023 | 9/23 | 23/00166-2 |
| 2 Býráðið | 27.04.2023 | 24/23 | 23/00166-2 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um loyvi at seta eina altan á neyst í stendur á matr.nr. 233 í Leirvík. Altanin kemur at standa niðanfyri neysti og kemur inná matrikkulin 169a í Leirvík. Støddin á altanini er 3.3 m long og 1.1 m breið.<br><br>Ánari av matrikkul 169a er Eysturkommuna og øki liggur sambært Almennu byggisamtyktini í øki G – Neystaøki. Um býráði vil loyva umsøkjaranum at seta altan upp, er neyðugt at geva frávik.<br><br>Eysturkommuna hevur áður játtað byggiloyvi til altan á matr. nr. 258 í sama øki. Sí mál 14/00413.<br><br>Sí skjøl í málinum |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at ganga umsóknini á møti við tí treyt at altanin ikki kemur meira enn 1 metur fram um neysti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. april 2023**
Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, treyta av at altanin er sjálvberandi.

Petur Súni Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.

**Býráðið 27. apríl 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini.

Petur Súni Jacobsen var úti undir viðgerðini vegna ógegni.

Eysturkommuna

## 25/23 Umsókn um altan til neyst á Matr.122 í Syðrugøtu

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi - og býarskipanarnevnd | 20.04.2023 | 10/23 | 23/00195-3 |
| 2 Býráðið | 27.04.2023 | 25/23 | 23/00195-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eysturkommuna hevur móttikið umsókn um loyvi at seta eina altan á neyst í stendur á matr.nr. 122 í Syðrugøtu. Altanin kemur at standa niðanfyri neysti og kemur inná matrikkulin 37 í Syðrugøtu. Ánari av matrikkul 37 er Eysturkommuna og øki liggur sambært Almennu byggisamtyktini í øki G2 – Neysta- og vinnubygging. Í økinum er gjørd serstøk byggisamtykt og um Býráði vil loyva umsøkjaranum at seta altan upp, er neyðugt at geva frávik.<br><br>Sambært §8. í serstøku Byggisamtyktini fyri øki, stendur skriva.<br><br>UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI.<br>Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.<br><br>Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.<br><br>Umsitingin metur ikki at dámurin í økinum verður broyttur, sambært tí sum byggisamtyktin roynir at skapa í økinum.<br><br>Sí skjøl í málinum |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Ongar |

| **Tilmæli** |
|---|
| Mælt verður til, at ganga umsóknini á møti, við tí treyt at altanin at altanin ikki kemur meira enn 1 metur fram um neysti. |

**Byggi - og býarskipanarnevnd 20. april 2023**

Byggi- og býarskipanarnevndin tekur undir við tilmælinum hjá umsitingini, treyta av at altanin er sjálvberandi.

**<u>Býráðið 27. apríl 2023</u>**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Byggi – og býarskipanarnevndini.

## 26/23 Frágreiðing og tilmæli til mál nr. 21/00389 - Umsókn um stuðul til Filmsætlan um Verdandi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 20.10.2021 | 53/21 | 21/00398-2 |
| 2 Mentanarnevndin | 27.09.2022 | 46/22 | 21/00398-2 |
| 3 Mentanarnevndin | 18.04.2023 | 13/23 | 21/00398-2 |
| 4 Fíggjarnevnd | 24.04.2023 | 24/23 | 21/00398-2 |
| 5 Býráðið | 27.04.2023 | 26/23 | 21/00398-2 |

**Málslýsing:**

Talan er um umsókn um stuðul til ein film um Verdandi, sum gekk burtur i 1944 við 14 monnum. Leikluturin hjá Óla Jacobsen, sum er avsendari av umsóknini er, at útvega teimum, sum ætla at gera filmin, tað søguliga grundarlagið fyri hesi ætlan. Hetta er í høvuðsheitum frásøgnin i bókini "Havið tók teir" um Verdandi. Eisini hevur Óli verið til handa í praktiskum spurningum.

Filmurin er sum so fiktión, men hann er bygdur yvir umrøddu hending og søguna um eina av einkjunum, Simonu Petersen i Syðrugøtu, og hvussu hon kláraði seg einsamøll við tveimum smáum døtrum. Hetta gjørdi hon fyrst og fremst við at binda skipstroyggjur o.a. fyri ta fyritøkuna, sum førdi til Tøtingarvirki.

Tað áhugaverda við hesi ætlan er, at hetta vist er fyrstu ferð, at tað verður gjørdur ein spælifilmur, sum er grundaðar á okkara sigling undir seinna heimsbardaga og um lagnuna hjá einari av einkjunum í teirri tíðini.

Tað er eisini áhugavert, at tað júst eru týskarar, sum standa aftanfyri hesa ætlan.

Nú er skjótt klárt til at fara undir upptøkur, men tað manglar tann endaliga fíggingin.

Hetta er so ein formell umsókn, men koma aðrir upplýsingar um verkætlanina sum tíðin líðir.

**Ískoyti 18.04.2023:**

**Filmsráðgevin lýsir verkætlanina soleiðis:**

**Lýsing av verkætlan:**

Søkt verður um stuðul til framleiðlsuna av spælifilminum Verdandi, sum verður framleitt týsku Dagmar Knopfel. Filmurin fer at snúgva seg um umrøddu hendingina og søguna um ein av einkjunum, Simonu Petersen í Syðrugøtu, og hvussu hon kláraði seg eftir Verdandi fekk burtur í 1944. Óli Jacobsen hevur verið ráðgevið hjá tí týska framleiðslu toyminum, og tær hava verið í Føroyum og gjørt royndarupptøkur. Eisini fer Kykmyndir at samframleiða verkætlanina. Í 2024 verður fari í gongd við upptøkur í Gøtu, Rituvík og

aðrastaðni í Føroyum Sera roynd og kend føroysk nøvn eru knýtt at verkætlanini: Eivør, Annika Hoydal, Gunnvá Zachariasen, Hans Torgarð, Durita Dahl Andreasen, Búi Rouch osv.

Søkt verður um : 372.578kr

**Meting av verkætlan:**

Umsóknin og alt tilfarið er sera týðiligt og greitt. Søgan um Simonu og um Verdandi er rørandi og góð, og handritið er serstakliga lovandi. Stigtakararnir eru týskir, men tær hava fingið góða hjálp frá einum føroyingi, sum hevur nógva vitan kring evnið, og tað sæst aftur á søguni. Tað er jaligt, at umsøkjarin ynskir at gera framleiðsluna so føroyska sum gjørligt. Tað ger nemliga, at føroysk filmsfólk fáa arbeiði, og at tey fáa fleiri royndir innan filmslist. Tað eru verkætlanir sum hesar, sum gera at vit menna okkum, sum filmsvinnuland. Fíggjarætlanin sær realistisk út, tó er fíggjarætlanin frá september 2022, og tí kann hon vera broytt nakað síðan tá. Jón Hammer, sum er sera royndur í at fáa størri filmsverkætlanir til Føroya, stendur eisini aftanfyri Nógv visuelt tilfar er viðheft umsóknini, sum gevur eina klára mynd av, hvønn veg verkætlanin fer listaliga. Tað eru vakrar myndir av Føroyum – og mest í Gøtu. Tað er eisini tiltalandi fyri júst hesa umsóknina. Við øllum tilfarinum sum er viðheft í huga, vil eg mæla til at stuðla verkætlanini 100.000kr

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
| --- |
| Eingin peningur er avsettur til endamálið á Fíggjarætlanini fyri 2021<br>Ískoyti 31.01.2021:<br>Eingin peningur varð settur av til endamálið á fíggjarætlanini fyri 2023. |

| **Tilmæli** |
| --- |
| Umsitingin mælir til, at prinsipiell avgerð verður tikin til um kommunan skal stuðla verkætlanin ella ikki, og um so er, at kommunan ynskir at stuðla, at umsitingin heitir á umsøkjaran og framleiðaran um at koma við fleiri ítøkiligum upplýsingum – so sum, tíðarætlan, kostnaðarætlan og hvar hesin filmur verður at síggja. |

**Mentanarnevndin 20. oktober 2021**

Samtykt at umsitingin kannar ymisk viðurskiftir aftanfyri verkætlanina nærri áðrenn støða kann takst til um og í hvønn mun Eysturkommunu eigur at stuðla nevndu filmsverkætlan

**Mentanarnevndin 27. september 2022**
Nevndin hevur umrøtt málið og mælir til, at umsóknin verður viðgørt vð fíggjarætlanararbeiði fyri 2023. Í verandi stund er eingin peningur tøkur á stuðulskonto fyri 2022.

**Mentanarnevndin 18. apríl 2023**
Mentanarnevndin mælir til at lata stuðul á kr.100.000,- (Satspulja)

**Fíggjarnevnd 24. apríl 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini dagf. 18. apríl 2023

**Býráðið 27. apríl 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hja Fíggjarnevndini.

## 27/23 Umsókn um stuðul - Tinganes (stuttrøð)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.04.2023 | 15/23 | 22/00442-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.04.2023 | 25/23 | 22/00442-4 |
| 3 Býráðið | 27.04.2023 | 27/23 | 22/00442-4 |

**Málslýsing:**

**Filmsráðgevin lýsir verkætlanina soleiðis:**
**Lýsing av verkætlan:**
Torfinnur Jákupsson, sum er maðurin handan TROM, fer nú undir næstu krimirøð hansara.
Verkætlanin ber heitið Tinganes og tekur støði í skaldsøguni Vit, Føroya Fólk eftir Bjørk Mariu Kunoy.

Sendirøðin er í 6 pørtum á 45 min hvør, og gongdin fylgir bókini, tó summar broytingar vera, so tað hóskar seg til eina sendirøð. Røðin snýr seg um nývalda løgmannin Magnus Tindhólm (Olaf Johannessen), sum ikki hevur nógvar royndir innan politiska ella geopolitiska heimin, sum vísir seg at vera torført at navigera í.
Søkt verður um stuðul til søgu- og hugskotsmenning og undanframleiðslu, sum verður frá várinum 2023 til heystið 2024.

**Meting av verkætlani:**
Umsóknin er væl skriva og er ógvuliga greið. Alt tilfarið, sum er viðheft er visuelt vakurt, og ein far ein ógvuliga greiða fatan av, hvat umsøkjarin ynskir at gera og skapa. Torfinnur Jákupsson hevur royndir við at skriva bøkur um til sendirøðir.
Trom hevur havt eina ótrúliga góða móttøku í allari verðini, og tí hevur Tinganes eisini góðar fortreytir til at fáa líka góða móttøku. Søgan er fangandi og er sera viðkomandi í dag, og tí vildi eg mett, at sendirøðini er ikki bara áhugaverd í Føroyum, men í øllum norðanlondum og restina av verðini. Øll venda nøsina norðureftir, og eru byrjaði at síggja týdningin av tí arktiska økinum. Pitchini, ið eru viðheft umsóknini, eru vælskrivaði og sera væl greidd frá. Tann listaligi stílurin er lagdur og søgan er serstakliga spennandi.
Fíggjarætlanin sær realistisk út, og passar gott til eina søgu- og hugskotsmenning og undanframleiðslu. Tað er jaligt, at umsøkjarin hevur lagt dent á týdningin at hava aðrir høvundar inn yvir verkætlanina, og har við at skapa eitt 'writers room'. Við at hava fleiri høvundar inni, kunnu vit vænta eina meira gjøgnumførda og gjøgnumtonkta søgugongd. Tað hevur sum oftast spart vekk í Føroyum, og tað sæst ofta aftur. Tískild tykist hendan verkætlanin professionel. Í fíggjarætlanini er tað tó ikki viðmerkt, hvussu nógv verður søkt um í hesari umsóknini, eiheldur hvar aðrastaðni søkt verður.

Tá alt kemur til alt, so mæli eg til at stuðla verkætlanini við 100.000kr

**Fíggjarligar avleiðingar:**

| **Tilmæli** |
| --- |
| |

**Mentanarnevndin 18. apríl 2023**
Mentanarnevndin mælir til at lata stuðul á kr. 100.000,- (Satspulja)

**Fíggjarnevnd 24. apríl 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 27. apríl 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

## 28/23 Umsókn um stuðul - Tónleikasamtakið Grót

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.04.2023 | 32/23 | 23/00118-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.04.2023 | 26/23 | 23/00118-3 |
| 3 Býráðið | 27.04.2023 | 28/23 | 23/00118-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Tónleikasamtakið Grót søkir um stuðul til rakstur av Tøting. Søkt verður um kr. 50.000,-<br><br>Seinastu árini er stuðlað soleiðis:<br>2022: kr. 15.000,-<br>2021: kr. 40.000,-<br>2020: kr. 40.000,-<br>2019: kr. 50.000,- |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru kr. 350.000,- settar av á rakstrarkonto 522 – “Stuðul til mentan”. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at lata stuðul. |

**Mentanarnevndin 18. apríl 2023**
Mentanarnevndin mælir til at stuðul verður latin á kr. 40.000,-

**Fíggjarnevnd 24. apríl 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 27. apríl 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

## 29/23 Umsókn um stuðul til Eldrafelagið Fjallið 2023

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.04.2023 | 31/23 | 23/00140-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.04.2023 | 27/23 | 23/00140-3 |
| 3 Býráðið | 27.04.2023 | 29/23 | 23/00140-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Eldrafelagið Fjallið søkir um stuðul til virksemið.<br>Í 2021 og 2020 fekk eldrafelagið kr. 40.000,- í stuðli.<br>Biðið verður somuleiðis um kr. 40.000,- í ár. |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru kr. 350.000,- settar av á rakstrarkonto 522 – “Stuðul til mentan”. |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at lata stuðul. |

**Mentanarnevndin 18. apríl 2023**
Mentanarnevndin mælir til at stuðul verður latin á kr. 40.000,-.

**Fíggjarnevnd 24. apríl 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 27. apríl 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

## 30/23 Umsókn um Mentanarstuðul - Skótaliðið Leirvíks Páll

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.04.2023 | 29/23 | 23/00162-3 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.04.2023 | 28/23 | 23/00162-3 |
| 3 Býráðið | 27.04.2023 | 30/23 | 23/00162-3 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| Skótaliðið Leirvíks Páll søkir um stuðul til rakstur og íløgu.<br>Biðið verður um kr. 60.000,- |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| Á fíggjarætlanini fyri 2023 eru kr. 350.000,- settar av á rakstrarkonto 522 – "Stuðul til mentan". |

| **Tilmæli** |
|---|
| Umsitingin mælir til at lata stuðul. |

**Mentanarnevndin 18. apríl 2023**
Mentanarnevndin mælir til at stuðul verður latin á kr. 40.000,-.

**Fíggjarnevnd 24. apríl 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 27. apríl 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini.

# 31/23 Umsókn um stuðul til filmsverkætlan - Trøllini og huldugentan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 18.04.2023 | 17/23 | 23/00171-4 |
| 2 Fíggjarnevnd | 24.04.2023 | 29/23 | 23/00171-4 |
| 3 Býráðið | 27.04.2023 | 31/23 | 23/00171-4 |

| **Málslýsing:** |
|---|
| **Filmsráðgevin lýsir verkætlanina soleiðis:**<br>**Lýsing av verkætlan:**<br>Søkt verður til undanframleiðslu av animatiónsfilminum Trøllini og Huldugentan. Filmurin fer at snúgva seg um ein pápa, ið lesur úr eini bók fyri døttur síni. Bókin snýr seg um eina huldugentu og tvey trøll sum ferðast kring Føroyar. Á ferðini møta tey ymiskum djórum/ verum/ menniskjum, sum vit kenna frá sagnum. Í undanframleiðsluni skulu umsøkjarin fáa fatur á rættari tøknini, sum krevst til slíka framleiðslu.<br><br>Søkt verður um 100.000kr til undanframleiðsluna, og 50.000kr til at luttaka á einum festivali.<br><br>**Meting av verkætlan:**<br>Hendan verkætlanin er sera nýhugsandi, og ein nýggjur máti at fortelja søgur uppá í føroyskum høpi. Søgan er einføld og løtt at skilja fyri tann ið lesur. Tað er jaligt. Tað sæst at umsøkjarin hevur stóra vitan innan animatiónsfilm, og haraftur eru sera roynd fólk handan verkætlanina. Tað krevst nemliga nógv tøkni, og tað er serstakliga dýrt at gera slíkan film. Umsøkjarin er komin langt í menningini, og tað sæst at hettar er ein verkætlan, sum er gjøgnumtonkt, og er serstakliga lovandi. Tað verður lagt nógv orka í at menna alla útgerðina og tað tekniska handan ein sovorðnan film, tí tað er helst fyrstu ferð at ein sovorðin filmur við so professionellari tøkni verður gjørdur í Føroyum. Tó kann menningin av søguni og dramaturgiin gloymast í allari tí tøkniligu menningini. Eg vildi viðmælt, at umsøkjarin leggur størri dent á at menna handrit og søgugongd.<br><br>Eg vil mæla til at stuðla verkætlanini í undanframleiðsluni við 50.000kr |

| **Fíggjarligar avleiðingar:** |
|---|
| |

| **Tilmæli** |
|---|
| |

**Mentanarnevndin 18. apríl 2023**
Mentanarnevndin mælir til at stuðul verður latin á kr.50.000,- til undanframleiðslu (Satspulja).

**Fíggjarnevnd 24. apríl 2023**
Mæla til at taka undir við tilmælinum hjá mentanarnevndini.

**Býráðið 27. apríl 2023**
Einmælt samtykt at taka undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini

fundurin lokin kl. 18:00

Per Martin Gregersen

Katrin Kjartansdóttir

Magnus Skoralíð

Marjun Andreasardóttir

Rúni Justinussen

Marita Klein Joensen

Petur Súni Jacobsen

Hjalti Dalheim

Hanna Jensen